DAGSINS MEINING

Fólkaatkvø›a sum samgongukitt

Herfyri eydna›ist samgonguflokkunum at halda saman og geva almenninginum fatan av, at ta› gongur væl í landsst‡rinum og eru flokkarnir samdir um at broyta politikkin í sambandi vi› framtí›arstø›u Føroya. Á tí›indafundi var› kunngjørt, at nú hev›i samgongan valt at sigla millum skerini í fullveldismálinum men tó vi› somu kós. Dagin eftir "semjuna" fór varaløgma›ur út í blø›ini og leg›i ávíst áramál fram. Ta› fekk ø›i í løgmann, sum setti varaløgmann uppá pláss. Ta› rætta hev›i veri›, um andstø›an var› tikin uppí samgonguna so ella so - ella at úrskriva› var› n‡val. Ísta›in fyri vit eina ney›loysn, har ein n‡ggjan sjálvst‡risætlan - eitt slag av stig fyri stigætlan - skal avloysa fullveldisætlanina.

Ta› er eingin loyna, at ósemja er í Tinganesi. Ta› tr‡st, i› baklondini í Fólkaflokkinum og Sjálvst‡irisflokkinum, hava lagt á síni umbo›, hevur tvinga› Tjó›veldisflokkin til antin at gó›taka broytta politikkin ella at fara. Innanh‡sis í Tjó›veldisflokkinum er sjálvsagt stór ónøgd vi› formann floksins, sum hevur veri› noyddur at boyggja seg fyri kravinum frá løgmanni. Forma›ur Tjó›veldisfloksins er sjálvur l sekur í, at hansara egnu fólk nú krevja, at hann ikki letur løgmann tr‡sta seg ov langt til eina "brei›a semju" loysn. Hóast sami forma›urin fyrr hevur gjørt vart vi›, at Tjó›veldisflokkurin hevur flutt seg langt fyri at fáa eina semju, átti hann at vita›, at handfaringin av fullveldismálinum hevur veri› alt ov snævurskygd og alt ov nógv merkt av, at Tjó›veldisflokkurin skuldi eiga æruna av komandi útviklingi.

Tr‡st elvir til móttr‡st, og ta› er júst ta›, i› er hent í málinum, bæ›i innanh‡sis í Føroyum og millum Føroyar og Danmark. Og størsta mistaki› gjørdi Tjó›veldisflokkurin, tá hann ikki gjørdi meira fyri at fáa Javna›arflokkin vi› í landsst‡ri›. Ta› er har vit skulu finna veruligu orsøkina til verandi stø›u. At flokkurin seinni eisini gekk vi› til at koyra formann Javna›arfloksins frá sum formann í Uttanlandsnevndini og seta ein av sínum egnu í henda fyri demokratisku gongdina t‡›andi sess, var enn eitt stórt mistak.

Nú liggur Tjó›veldisflokkurin sum hann hevur reitt. Hann hevur bert eitt at gera og ta› at vera løgmanni l‡›in. Eftir skorflongjuna fyri at hava útmelda› seks ára áramáli› fyri n‡ggju ætlanini fer neyvan at koma nógv ítøkiligt frá hansara sí›u. Tó so - fólkaatkvø›an skal nú snikkast til, so hon m.a. kann bjarga andliti› hjá ikki minst tjó›veldisformanninum. Vit bera ótta fyri, at einasta orsøk til at koma vi› eini fólkaatkvø›u nú alt er vent í málinum er fyri at kunna halda samgonguni saman. Ein fólkaatkvø›a átti at veri› alt ov álvarslig til at ver›a brúkt sum samgongukitt.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI



Terje Dal-Christiansen farin

Fyrranáttina anda›ist Terje Dal-Christiansen í Havn 73 ára gamal. Terje var› føddur í Havn hin 8. desember í 1926 og var sonur Sofus og Rosu Dal-Christiansen. Hann vaks upp á Áarvegnum í Havn, har Hotel Hafnia er í dag.

Terje tosa›i ofta um umhvørvi› á Áarvegnum og har um lei›ir. Hann mintist m. a., tá teir løgdu lok á fyrsta partin av Havnará - sum jú rann beint fram vi› húsunum, har hann vaks upp.

Terje var skipari, og fór sum ungur til skips, og var mong ár fiskima›ur. Hann sigldi í mong ár vi› donskum farmaskipi í Mi›jarahavinum og upp á Amerika. Eisini hevur hann siglt vi› fer›amannaskipi upp á Finnland.

Terje giftist í 1961 vi› Sunnvá, dóttir Edvard í Rættará og Biritu Lindenskov í Havn. Tey eiga f‡ra børn, Rosu-Bergittu, Kára, Sophus og Hans Áka.

Fyrstu árini bú›u Sunnvá og Terje í Keypmannahavn, men tey fluttu heim fyri 30 árum sí›ani og bygdu á trø›ni hjá Edvardi uppi í Tórfinsgøtu.

Naka› eftir at tey fluttu heim, leg›ist Terje uppi og fór at arbei›a í umsitingini á Baccalao í Havn, seinni Fiskavirking.

Tá hann fór frá fyri aldur, settist hann ikki hendur í favn, men fekk sær fena› saman vi› vinmanninum, Eigil Hansen, skipara, bæ›i sey›, gæs, dunnur og eplaveltu.

Terje var ein vinsælur og virkin ma›ur. Hann hev›i stóran áhuga fyri tí, i› rørdist í Havnini, og var ofta at síggja, tá HB leikti í Gundadali ella tá Kyndil spældi í høllini. Synirnir Sofus og Hans Áki eru millum frægastu hondbóltsleikarar, Kári gjørdist sjóma›ur burturav og er í løtuni vi› vaktarskipi›. Rosa Bergitta er útbúgvin pedagogur, og hon b‡r saman vi› manninum, Jan og synunum í húsunum hjá abbanum í Tvørgøtu.

Trúgvur kirkjugangari, sum hann var, so var Terje at síggja í Vesturkirkjuni fyri trimum vikum sí›ani, hóast hann longu tá hev›i fingi› tungu bo›ini.

el

Haldor Christiansen, keypma›ur, 75 ár



Í gjár 9. november, var› Haldor Christiansen í Havn 75 ár. Haldor er kenda andliti› í gamla handlinum í Bringsnargøtu, hjá Katrina Cristiansen.

Eftir studentsprógvi› fór tann ungi Haldor til Keypmannahavnar at lesa ví›ari. Men hetta fekk ein brá›an enda, tá mó›urin brádliga doy›i, og Haldor tí vendi heimaftur at taka vi› lei›sluni av tí stóra handlinum í Bringsnargøtu.

Foreldur hansara vóru Katrina, fødd Petersen, og Viggo Christiansen, bæ›i havnarfólk

Handilshúsini í Bringsnargøtu hava sína serligu søgu. Ta› var gamli handilin hjá Zacharias Heinesen, og har var skaldi› William Heinesen eisini føddur.

Í dag er handlin hjá Haldori tann einasti, sum eftir er í tí gomlu høvu›sgøtuni í Havn - og ta› má sigast at vera ein serligur hugni at koma inn í handilin hjá Haldori. Sjálvur er hann mi›depulin - keypma›urin, sum ger alt fyri kundan, og tú fært altí› eitt vir›ismiki› prát.

Vi› Haldori er kanska søga skriva›, sum gongur langt aftur í árini og vekir minni og huglei›ingar um tí›ina farnu.

Ta› kann av sonnum sigast um Haldor, at hann er hjálpsamur. Hann er altí› til rei›ar vi› tí hjálpandi hondini. Gjøgnum árini hevur hann t. d. veri› limur í Líkningarnevndini fyri Fólkaflokkin í mong ár, er virkin í Lionsfelagsskapinum og hann er fastur fúsur, tá føroyskur dansur er í Hornahúsinum.

Fø›ingardagin hev›i Haldor saman vi› familjuni heima í Tróndargøtu.

†

Ætt, vinum og kenningum verður gjørt kunnugt at kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi og bróðir

TERJE DAL CHRISTIANSEN

doyði mikudagin 08. november.

Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 10. november kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 11. november kl. 14.00.

Fyri tey avvarðandi

Sunnvá, Rosa Birgitha, Kári, Sophus Edward og Hans Áki

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Ingeborg er ond

Forma›urin í Føroya Arbei›arafelag er í ø›ini um, at landsst‡risma›urin í fíggjarmálum ikki tykist sinna›ur at lata dagrøktarmammur fáa frí 1. mai

SÁTTMÁLATRÆTA
Edvard Joensen

Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, fær eina alvorliga skortfleingju í brævi frá Ingeborg Vinther, formanni í Føroya Arbei›arafelag.

Ingeborg Vinther er í ø›ini um, at Karsten Hansen í brævi til Hósvíkar Kommunu sigur seg meta ta› óheppi›, at 1. mai ver›ur fastur frídagur hjá dagrøktarmammunum.

Hesa or›ingina heldur forma›urin í Føroya Arbei›arafelag vera slíka ni›urger› av ávísum løntakarabólkum, sum sjálvdan er sædd á›ur.

Grundin til har›ligu átaluna, fíggjarmálará›harrin fær frá Føroya Arbei›arafelag, er bræv, sum landsst‡risma›urin hevur sent Hósvíkar Kommunu vi› vi›merkingum til sáttmála millum Føroya Arbei›arafelag og Hósvíkar Kommunu um dagrøktarmammurnar – og pápan – hjá kommununi.

Landsst‡risma›urin hevur vi›merkingar til tr‡ ting í sáttmálanum. Lønina, frídagar og ásetingar um matpakkar og skiftiklæ›i, børnini skulu hava vi› í dagrøkt.

Lønina heldur landsst‡risma›urin í fíggjamálum vera ov høga og vil hava eina n‡ggja útrokning.

At dagrøktarmammurnar skulu hava frí1. mai, metir landsst‡risma›urin óheppi›, tí ta› hava onnur, sum arbei›a vi› barnaansing, ikki, sigur hann.

Og ásetingar um, hvørt børnini skulu hava matpakka og skiftiklæ›i vi›, heldur hann, at dagrøktarskipanin, t.v.s. arbei›sgevarin, eigur at gera regluger›um.

Í brævi til Karsten Hansen, landsst‡rismann, sum eisini er sent fjølmi›lunum, sigur Ingeborg Vinther, forma›ur í Føroya Arbei›arafelag, at ta› er so eitt, at landsst‡risma›urin roynir at forpurra lønarásetingarnar, sum Hósvíkar Kommuna og Føroya Arbei›arafelag eru samd um.

Føroya Arbei›arafelag heldur, at fíggjarmálará›harrin eigur at halda fingrarnar burtur frá avtaluni, tá partarnir eru vor›nir samdir um or›ingina.

Men verri er, at landsst‡risma›urin í fíggjarmálum fer at leggja seg út í, hvørjar frídagar, partarnir avtala sínamillum.

Føroya Arbei›arafelag metir ta› ovbo›i›, at landsst‡risma›urin vil for›a nøkrum limum felagsins í at hava frí 1. mai, sjálvan altjó›a arbei›aradagin. Felagi› ger prúra greitt, at allir limir felagsins uttan undantak hava frí 1. mai.

Ta› er ovbo›i›, heldur Føroya Arbei›arafelag, sum sigur seg ongantí› fyrr hava uppliva› slíka vanvir›ing av løntakarunum. Og her hevur felagi› skyldu at tala at, sigur Ingeborg Vinther, forma›ur í Føroya Arbei›arafelag í brævi til Karsten Hansen , landsst‡rismann.

Einasti dagrøktarpápi í landinum er í Hósvík og honum vil Karsten Hansen ikki geva frí 1. mai

Mynd: Jens Kr. Vang

Karsten Hansen sigur kortanei til at gjalda meir

- Landskassin hevur longu betalt 25 milliónir fyri at hjálpa teimum ringast støddu kommununum burturúr skuldini. Og ta› kemur ikki uppá tal, at vit fara at betala endurgjaldskrøv eisini

KOMMUNUSKULD
Áki Bertholdsen

Tær kommunurnar í Føroyum, sum skylda mest, skulu ikki vænta sær meiri hjálp úr Landskassanum.

Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, sigur, at ta› kann ikki koma uppá tal at landskassin fer at betala meiri fyri at hjálpa teimum ringast støddu kommununum burturúr skuldini.

Annars skilst á grein a›rasta›ni í bla›num, at ta› hevur ta› veri› uppá tal at royna at fáa landskassan at hjálpa til eitt sindur afturat fyri at fáa tær mest skuldarbundnu kommunurnar upp á føtur aftur.

Landskassin hevur longu betalt 25 milliónir krónur fyri at hjálpa teimum ringast støddu kommununum og ta› kann ikki koma uppá tal at brúka meiri til hetta endamáli›, sigur Karsten Hansen

Løgtingi› hevur samtykt, at sanera tær ringast staddu kommunurnar vi› peningi úr Kommunala Ve›haldsgrunninum.

Men st‡ri› fyri grunnin er nú komin til ta ni›urstø›u, at lógin er so ógrei›, at heimildirnar at betala út eftir honum eru ivasamar.

Tí skuldi fundur vera vi› løgmann um landskassin er sinna›ur at átaka sær møgulig endurgjaldskrøv frá kommunum, sum ikki gó›taka, at peningur ver›ur brúktur úr ve›haldsgrunninum til at sanera kommunur fyri.

Kemur ikki upp á tal

Men Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggj-armálum, sigur, at ta› kemur ikki upp á tal, at landskassin fer at átaka sær møgulig endurgjaldskrøv.

–Landskassin hevur goldi› 25 milliónir til at hjálpa teimum ringast støddu kommununum burtur úr skuldini. Og vit fara ikki at at betala meiri til ta› endamáli›, sigur fíggjarmálará›harrin.

Hann sigur, at ta› eru ikki meiri enn tvey ár sí›ani, at kommunurnar vóru sinna›ar at brúka allan ve›haldasgrunnin til at hjálpa teimum ringast støddu kommununum.

– Men nú tykist sum um samhaldsfesti› er vikna›, sigur hann. Fyri at fáa eina loysn á málinum leg›i landskassin 25 milliónir á bor›i›. Og ta› ber ikki til at tosa um, at landskassin skal blandast meiri uppí hetta máli›.

Hann sigur, at ta› ber heldur ikki til hjá landskassanum at lova at betala møgulig endurgjaldskrøv.

– Gera vit ta›, er ta› ta› sama sum at bi›ja um endurgjaldskrøv, sigur hann.

Hann sigur, at eisini lógfrø›iliga er ta› ikki sum at siga ta›, tí so skal peningur útvegast til endamáli› og ta› kann bara løgtingi› gera.